# LØGTINGIÐ

## TINGHÚSVEGUR 1 - 3

## GRANNSKOÐANARFRÁGREIÐING

## 2004

**FRUMRIT**

**Inngangur**
Vit hava grannskoðað tær kontur, sum eru á §1 í Landsroknskapinum fyri 2004 - roknskap løgtingsins, umsiting tess og stovnar, knýttir at løgtinginum.

*Frágreiðing okkara hevur verið send leiðsluni á umsiting tingsins, Súsonnu Danielsen, leiðsluni á Landsgrannskoðanini, Leivur Harryson og Løgtingsins umboðsmanni, Sólju í Ólavsstovu, til ummælis. Teirra viðmerkingar eru tilskilaðar í frágreiðingini.*

**Grannskoðanin**
Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í ársroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rætta mynd av fíggjarliga virksemi løgtingsins fyri 2004.

## Grannskoðanin

**Alment**
Vit hava við stakroyndum eftirkannað sannanina viðvíkjandi upphæddum og upplýsingum í rakstrar-roknskapinum. Vit hava gjøgnumgingið og mett um mannagongdir og innaneftirlit, ið hava týdning fyri uppsetingina av rakstrarroknskapinum. Harumframt hava vit við stakroyndum kannað skjalatilfarið og tilhoyrandi bókingar. Vit hava við stakroyndum kannað kostnaðarskjøl, til tess at staðfesta, um skjøl eru ávíst og váttað av rætta viðkomandi, rætt bókað og annars hoyra stovninum til. Vit hava ikki viðmerkingar viðv. gjøgnumgongd okkara av kostnaðarskjølum.

Grannskoðanin av ársroknskapinum umfatar m.a. eina kanning av upphæddunum í rakstrarroknskapinum, íroknað eina samanbering við undanfarin ár og givnum játtanum.

Vit hava somuleiðis gjøgnumgingið fundarfrágreiðingar hjá formanskapinum fyri 2004 og fram til 16. november 2005. Vit hava ongar viðmerkingar í hesum sambandi.

**Lønir v.m.**
Lønir v.m. eru nógv tann størsti kostnaðarposturin hjá løgtinginum við tilhoyrandi stovnum. Tískil hevur grannskoðanin lagt serligan dent á at kanna lønarútgjaldingarnar v.m. fyri 2004. Kanningar okkara hava tikið støði í galdandi lóggávu, sáttmálum o.s.fr.

*Tingmenn*
Viðv. tingmonnum hava vit undir grannskoðanini kannað um samsýningar, kostnaðarendurgjøld og ferða- og dagpeningur uttanlands til løgtingsmenn er goldið í tráð við løgtingslóg nr. 12. frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Eftirlønir og bíðilønir eru somuleiðis kannaðar. Samanhildið er við galdandi sáttmálar.

Tingmenn verða samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki í tænastumannalógini, íroknað vanliga viðbót. Afturat hesum verður veitt árligt kostnaðarendurgjald, svarandi til flutningskostnað 100 ferðir aftur og fram árliga, koyripeningur millum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga, tímapening fyri 10 tímar dagliga í 100 dagar, tó fyri Suðuroyar tingmenn fullur dagpeningur í 100 dagar. Tingmenn í Tórshavn,

Hoyvík, á Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald. Harumframt verður veitt kostnaðarískoyti uppá kr. 2.000 um mánaðin.

Næstformonnum Tingsins og nevndarformonnum verður veitt ein samsýning, ið er kr. 30.000 árliga, tó so um tingmaður røkir meira enn eina av hesum uppgávum, so verður bert ein samsýning veitt.

Kostnaðarendurgjaldið verður lækkað við 1/100 av kostnaðarendurgjaldinum, fyri hvønn tingdag, tingmaður ikki møtir á løgtingsfundi. Løgtingsskrivstovan ger frádráttin upp á hvørjum ári í juni mánað. Vit hava staðfest, at tær reguleringar, ið eru framdar samsvara við undirliggjandi skjøl viðv. fráveru.

Grannskoðan okkara hevur eisini umfatað ferðaforskot og ferðauppgerðir hjá tingmonnum. Veitt verður ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir reglunum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins. Reglurnar eru ásettar í rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum dagfest 9. juli 1998 um tænastuferðir uttanlands v.m. Upphæddirnar eru ásettar í vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands.

Reglurnar í hesum rundskrivum verða í høvuðsheitum fylgdar, men tað kemur fyri, at serliga uttanfyri Danmark ikki ber til at fáa innivist fyri ásetta takstin. Eisini kann viðmerkjast, at verður tingmaður bjóðaður uttanlands, saman við hjúnafelag, fær hjúnarfelagin dagpening og endurgjald á jøvnum føti við tingmannin.

Staðfest er, at í nøkrum førum verða ferðauppgerðir ikki gjørdar upp skjótast møguligt eftir heimkomu. Mælt verður til at betra hetta, soleiðis at ferðauppgerðir kunnu verða latnar løgtingsskrivstovuni í seinasta lagi 1 viku eftir heimkomu, og at møgulig skuld verður avroknað í seinasta lagi 3 vikur, eftir heimkomu, samsvarandi rundskrivi um tænastuferðir uttanlands, ið kom í gildi tann 1. juli 1998.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

Komið er eftir, at løgtingið, ið einstøkum føri hevur útgoldið fyri tænastu, uttan at nøktandi skjalprógv eru fyri tænastuna. Heitt verður á løgtingsumsitingina, um bert at útgjalda fyri tænastur, tá ið nøktandi skjøl finnast fyri tænastuna, soleiðis at eingin ivi kann verða um, hvat goldið er fyri.

**Løgtingsskrivstovan, Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður**
Vit hava eisini fyri Løgtingsskrivstovuna, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann kannað, um útgoldnar lønir v.m. eru samsvarandi galdandi lønarsáttmálum við avvarðandi feløg, eins og skjalprógv fyri umflokkingum, setanarskrivum v.m. eru kannað.

Joen H. Andreassen fór frá sum løgtingsins umboðsmaður, hin 31. desember 2005. Frá 1. januar 2006 er løgtingsins umboðsmaður Sólja í Ólavsstovu.

Fleiri viðmerkingar eru ikki í hesum sambandi.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**
Stuðulin verður goldin, sambært Floksskrivarareglugerð frá 25. januar 2000, við tilhoyrandi broytingum 1. mars 2000. Hvør flokkur fær grundgjald uppá 73 t.kr. Harumframt hevur hvør flokkur rætt til 42 t.kr. árliga fyri hvønn tingmann meira enn ein.

Sambært §7 í reglugerðini verður roknskapurin í hesum sambandi grannskoðaður av grannskoðara tingsins.

Stuðulin verður umsitin av Løgtingsskrivstovuni, men hvør flokkur skal tilnevna ábyrgdarpersón, sum hevur ábyrgdina fyri, at stuðulin verður umsitin, sambært reglunum.

Vit hava skjalagrannskoðað kostnaðirnar viðv. stuðli til parlamentariska arbeiðið. Skjølini vórðu góðkend og ávíst av Løgtingsskrivstovuni og váttað av ábyrgdarpersóni fyri viðkomandi tingbólk.

Grannskoðan okkara hevur staðfest, at ábyrgdarpersónar eru tilnevndir, og at flokkarnir hava gjørt og

naryvirlit, sambært reglugerðina.

Sambært reglugerðini, skal í minsta lagi helvtin av stuðlinum nýtast til skrivara/r, t.v.s umframt løn, eisini frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld v.m.

Niðanfyri standandi talva lýsir, í hvønn mun síðstnevnda treyt er lokin:

| T.kr./flokkur | A | B | C | D | E | F | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umboð á tingið | 7 | 7 | 7 | 1 | 8 | 2 | 32 |
| Grundupphædd §1 | 73 | 73 | 73 | 73 | 73 | 73 | 437 |
| Tingmannaupphædd §2 | 251 | 251 | 251 | 0 | 293 | 42 | 1.089 |
| Stuðul tilsamans | 324 | 324 | 324 | 73 | 366 | 115 | 1.526 |
| Nýtsla 2004 | 308 | 346 | 323 | 76 | 247 | 98 | 1.397 |
| Meir/Minninýtsla | -17 | 22 | -2 | 3 | -119 | -17 | -129 |
| Lønir | 265 | 334 | 260 | 55 | 139 | 72 | 1.125 |
| Helvtin av stuðli til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Helvtin av kostn. til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| Max. helvtin av stuðli til annað enn lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |

Sum talvan vísir, er talan um eina minninýtslu uppá samanlagt 129 t.kr. Tó so er talan ikki um eina minninýtslu fyri hvørja tingmanning sær. Treytin um, at minst helmingurin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir er ikki lokin viðv. Tjóðveldisflokkinum. Verður hinvegin roknað í mun til avhildnan kostnað, lýkur flokkurin kravið.

Spurningurin er, um ásetingin, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir, er nóg greitt orðað. Men sambært Løgtingsskrivstovuni, hevur formansskapurin tulkað ásetingina soleiðis, at í mesta lagi helvtin av stuðlinum kann brúkast til annað enn til lønir. Fyri 2004 lúka allir flokkar hesa áseting, einsæris og samanlagt.

**Setanarskriv hjá Tinglimum**

Lóggávan ásetur, at løgtingsmaður, sum er í almennum starvi í mesta lagi kann starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri løgtingsmann. Vit hava kannað, um skjalprógv fyriliggur frá arbeiðsgevarum, ið koma undir hesa reglu, sum kom í gildi pr. 1. august 1999.

Enn einaferð, verður víst á, at viðurskiftini hjá Marjusi Dam, ikki eru komin í rættlag. Støðan er óheppin, tí viðkomandi tingmaður hevur ikki lokið treytirnar í § 3 í løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn tingmanna síðani lógin var sett í gildi. Vit endurgeva § 3 í løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn tingmanna niðanfyri:

> "§ 3. Løgtingsmaður, sum er í starvi hjá landinum, eini kommunu, kommunalum felagsskapi, landsfyritøku ella hjá einum konsessioneraðum felag, hevur rætt til farloyvi úr starvi sínum.
> Løgtingsmaður, sum hevur starv hjá einum stovni eftir 1. pkt. ella hjá ríkinum, kann í mesta lagi starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri tingmann."

Somuleiðis verður eisini heitt á løgtingsskrivstovuna, um at innheinta skrivligar váttanir fyri at varatingmenn, ið eisini hava annað alment starv, eru í farloyvi so leingi hann situr á tingi.

Spurningurin er, um reglurnar sum heild eru nøktandi. Lógarkravið viðv. starvsumráði v.m. er greitt, men hinvegin vanta greiðir sanktiónsmøguleikar, tá tingmaður ikki lýkur treytirnar.

Enn einaferð verður heitt á formansskapin, um at fáa hesi viðurskifti í rættlag sum skjótast.

**Góðkenning av roknskapi**
Í frágreiðing okkara undanfarin ár er heitt á formansskapin um, í sambandi við roknskapir, at innføra váttanarmannagongd fyri Landsgrannskoðanina, Løgtingsskrivstovuna og Løgtingsins Umboðsmann. Arbeitt hevur verið við málinum, tó uttan at avgreiða hetta. Heitt verður á formansskapin um at taka støðu til, um váttanarmannagongd skal setast í verk.

**Grannskoðanarfrágreiðing 2003**
Vit hava kannað og staðfest, at formansskapurin hevur viðgjørt og góðtikið grannskoðanarfrágreiðingina fyri 2003.

## Upplýsingar viðv. roknskapinum

Roknskapur løgtingsins við tilhoyrandi stovnum er settur upp í Landskassaroknskapinum fyri 2004.

Niðanfyri eru høvuðskontur á §1 settar upp. Yvirlitið vísir nýtslu og játtan fyri 2004. Upphæddirnar fyri 2003 eru somuleiðis vístar (t.kr.).

| | SKJAL | t.kr. 2004 | t.kr. Játtan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|---|
| **Løgtingið** | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | | 3.415 | 3.435 | 2.383 |
| Løgtingsarbeiði | | | | |
| Løgtingsmenn | | 15.558 | 16.607 | 15.408 |
| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | | 1.397 | 1.525 | 1.313 |
| Eftirlitsuppgávur | | 0 | 500 | 0 |
| Fyrisiting løgtingsins | | 6.229 | 6.330 | 5.706 |
| Løgtingsarbeiði tilsamans | A | 23.184 | 24.962 | 22.427 |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | | 814 | 2.500 | 11.567 |
| | | **27.413** | **30.897** | **36.377** |
| **Stovnar, knýttir at løgtinginum** | | | | |
| Landsgrannskoðanin | B | 4.543 | 4.855 | 4.427 |
| Løgtingsins umboðsmaður | C | 2.386 | 2.500 | 1.749 |
| | | **6.929** | **7.355** | **6.175** |
| **Kostnaður, løgtingið tilsamans** | | **34.342** | **38.252** | **42.553** |
| Játtan tilsamans | | 38.252 | | 47.325 |
| **Minninýtsla í mun til játtan** | | **3.910** | | **4.772** |

Niðanfyri hava vit gjørt viðmerkingar til útvaldar høvðuskontur í mun til játtanir og í mun til 2003. Viðmerkjast skal, at sambært játtanarskipanina, skulu játtanir haldast á høvuðskontustigi, og somuleiðis skulu lønarjáttanir haldast. Hinvegin kunnu frávik verða á standardkontum - undirkontur til høvuðskontur - í mun til tær ætlanir, stovnurin upprunaliga hevði.

**Samlaði raksturin**
Samanumtikið vísir roknskapurin fyri 2004, at talan er um eina minninýtslu í mun til játtan á øllum høvuðskontum. Kostnaðurin er samanlagdur 34,3 mió.kr., meðan játtanin er uppá 38,3 mió.kr. Kostnaðirnir eru lækkaðir samanlagt við 8,2 mió.kr., í mun til 2003. Høvuðsorsøkin til hetta er, at nýtslan í sambandi við nýggjan bygning til Føroya Løgting er 10,8 mió.kr. lægri í 2003, í mun til í 2004.

**Løgtingsmenn**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsmenn nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar, í mun til 2003 og í mun til ætlanina fyri 2004 (t.kr.):

| | 2004 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2003 | Munur 2003-04 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 12.504 | 12.702 | -198 | 12.200 | 305 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.040 | 1.780 | -740 | 1.309 | -270 |
| Avskrivingar | 4 | 0 | 4 | 4 | 0 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 1.836 | 1.900 | -64 | 1.777 | 59 |
| Tilskot til útlandið | 208 | 225 | -17 | 205 | 3 |
| Søla av vørum og tænastum | -35 | 0 | -35 | -87 | 52 |
| Innanh. flytingar | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 |
| | **15.558** | **16.607** | **-1.049** | **15.408** | **149** |

Verður samanborið við játtanina er talan um eina minninýtslu viðv. lønum á 198 t.kr. Tó eru lønirnar øktar við 305 t.kr., samanborið við 2003. Somuleiðis er talan um eina minninýtslu í sambandi við keyp av vørum og tænastum uppá 740 t.kr., samanborið við játtanina. Samanlagt er nýtslan 1.049 t.kr. minni enn játtanin.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

| | 2004 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2003 | Munur 2003-04 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.125 | 1.155 | -30 | 998 | 127 |
| Keyp av vørum og tænastum | 192 | 200 | -8 | 159 | 33 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 90 | 170 | -80 | 157 | -67 |
| Annað | -9 | 0 | -9 | 0 | -9 |
| | **1.397** | **1.525** | **-128** | **1.313** | **85** |

Talan er um eina minninýtslu viðv. lønum uppá 30 t.kr. Eisini er ein minninýtsla uppá 80 t.kr. viðv. keypi av útbúnaði. Samanlagt er talan um eina minninýtslu uppá 128 t.kr., í mun til játtan. Kostnaðurin er 85 t.kr. hægri í 2004 enn í 2003.

**Fyrisiting løgtingsins (Løgtingsskrivstovan)**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsskrivstovan nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2003 og í mun til ætlan fyri 2004 (t.kr.):

| | 2004 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2003 | Munur 2003-04 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 4.272 | 4.571 | -299 | 3.974 | 298 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.416 | 1.729 | -313 | 1.352 | 65 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 509 | 0 | 509 | 111 | 397 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 29 | 40 | -11 | 256 | -227 |
| Avskrivingar | 0 | 0 | 0 | 11 | -11 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 0 | 0 | 0 | 7 | -7 |
| Søla av vørum og tænastum | -1 | -10 | 9 | -5 | 4 |
| Skattur og avgjøld | 5 | 0 | 5 | 0 | 5 |
| Innanh. flytingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **6.229** | **6.330** | **-101** | **5.706** | **523** |

Útgreiningin vísir, at kostnaðirnir eru 523 t.kr. hægri í 2004, samanborið við 2003. Størsta hækkingin er keyp av útbúnaði, netto, ið er økt við 397 t.kr. Kostnaðurin til lønir v.m. er øktur við 298 t.kr., í mun til 2003. Samanlagt er talan um eina minninýtslu, samanborið við ætlanina uppá 101 t.kr.

Í skjali A, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Landsgrannskoðanin**
Niðanfyri er høvuðskontan landsgrannskoðanin nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2003 og í mun til ætlan fyri 2004 (t.kr.):

| | 2004 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2003 | Munur 2003-04 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.482 | 3.820 | -338 | 3.198 | 284 |
| Keyp av vørum og tænastum | 537 | 507 | 30 | 1.025 | -489 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 229 | 140 | 89 | 13 | 216 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 207 | 266 | -59 | 190 | 17 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 5 | 2 | 3 | 0 | 5 |
| Løgtingsgrannskoðararnir | 83 | 120 | -37 | 0 | 83 |
| | **4.543** | **4.855** | **-312** | **4.427** | **116** |

Sambært útgreiningini viðv. landsgrannskoðanini er talan um hækkingar á lønarøkinum - uppá 284 t.kr., í mun til 2003. Men í mun til lønarkarmin er talan um eina minninýtslu uppá 338 t.kr. á lønarøkinum. Kostnaðurin til keyp av vørum og tænastum er lækkaður við 489 t.kr., í mun til 2003 – og frávikið í mun til ætlan er uppá 30 t.kr. Samanlagt hevur stovnurin eina minninýtslu uppá 312 t.kr. í 2004. Kostnaðirnir eru hækkaðir við 116 t.kr., í mun til 2003.

Í skjali B, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Løgtingsins umboðsmaður**
Niðanfyri er høvuðskontan Løgtingsins umboðsmaður nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2003 og í mun til ætlan fyri 2004 (t.kr.):

| | 2004 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2003 | Munur 2003-04 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.597 | 1.600 | -3 | 1.368 | 228 |
| Keyp av vørum og tænastum | 411 | 600 | -189 | 316 | 94 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 217 | 0 | 217 | 8 | 210 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 165 | 150 | 15 | 56 | 109 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | 150 | -150 | 0 | 0 |
| Innanh. flytingar | -4 | 0 | -4 | 0 | -4 |
| | **2.386** | **2.500** | **-114** | **1.749** | **638** |

Virksemið hjá stovninum byrjaði í mars mánaði 2001. Í mun til ætlanina er talan um eina minninnýtslu uppá 114 t.kr. Størsta minninýtslan er innan keyp av vørum og tænastum - minninýtslan er uppá 189 t.kr. Samanborið við 2003 eru kostnaðirnir øktir við 638 t.kr.

Í skjali C, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Grannskoðaravváttan**
Vit skulu vátta, at vit lúka lógarinnar habilitetstreytir, og at vit undir grannskoðanini hava fingið allar tær upplýsingar, vit hava biðið um.

Tórshavn, hin 6. januar 2006

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

Jógvan Amonsson statsaut. revisor    Óli Joensen

**Undirritaðu vátta hervið at hava lisið grannskoðanarfrágreiðingina, hin ___ / ___ - 2006.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Edmund Joensen | Hergeir Nielsen | Vilhelm Johannesen | Óli Breckmann |
| formaður | 1. næstform. | 2. næstform. | 3. næstform. |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐIÐ

| Løgtingsmenn | t.kr. 2004 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 12.009 | | 11.391 |
| Tænstumenn | 0 | | 380 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 295 | | 339 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 200 | | 159 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | 0 | | -70 |
| **Lønir v.m.** | **12.504** | **12.702** | **12.200** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 5 | | 50 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 756 | | 842 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 3 | | 0 |
| Umboðan | 196 | | 210 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 0 | | 14 |
| Keyp av vørum annars | 2 | | 1 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 78 | | 193 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.040** | **1.780** | **1.309** |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | | 0 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **0** | **0** | **0** |
| Húsaleiga | 0 | | 0 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 0 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| Rakstraravskrivingar | 4 | | 4 |
| **Avskrivingar o.a.** | **4** | **0** | **4** |
| Utreiðslugreiddar veitingar | 1.836 | | 1.777 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **1.836** | **1.900** | **1.777** |
| Altjóða felagsskapir | 208 | | 205 |
| **Tilskot til útlandið** | **208** | **225** | **205** |
| Vørusøla til privat | -34 | | -87 |
| Vørusøla til almennar stovnar, virksemi og verkætlanir | -1 | | 0 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-35** | **0** | **-87** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn. | 0 | | 1 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **1** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsmenn tilsamans** | **15.558** | **16.607** | **15.408** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐIÐ - framhald

| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | t.kr. 2004 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 300 | | 13 |
| Tænastumenn | 382 | | 46 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 392 | | 892 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 17 | | 13 |
| Eftirlønir | 33 | | 32 |
| **Lønir v.m.** | **1.125** | **1.155** | **998** |
| Umboðan | 5 | | 0 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 1 | | 3 |
| Keyp av vørum annars | 74 | | 55 |
| Telefon | 68 | | 56 |
| Postgjøld | 1 | | 1 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 14 | | 20 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 28 | | 25 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **192** | **200** | **159** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 69 | | 132 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 21 | | 25 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **90** | **170** | **157** |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 0 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| Aðrar rakstrarinntøkur | -9 | | 0 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-9** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Stuðul til parlamentariska arbeiðið - tilsamans** | **1.397** | **1.525** | **1.313** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Eftirlitsuppgávur | t.kr. 2004 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **500** | **0** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Eftirlitsuppgávur - tilsamans** | **0** | **500** | **0** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐIÐ - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2004 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 3.173 | | 2.776 |
| Tænastumenn | 608 | | 586 |
| Tímalønt | 202 | | 285 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 15 | | 12 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 64 | | 49 |
| Eftirlønir | 316 | | 266 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | -105 | | 0 |
| **Lønir v.m.** | **4.272** | **4.571** | **3.974** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | -1 | | 2 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 98 | | 31 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 17 | | 0 |
| Umboðan | 8 | | 22 |
| Orkukeyp - el | 149 | | 36 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 89 | | 80 |
| Orkukeyp, maskinur, flutningsútbúnaður o.a., olja, oljuúrdrát | 3 | | 0 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 12 | | 6 |
| Keyp av vørum annars | 167 | | 166 |
| Telefon | 66 | | 142 |
| Postgjøld | 11 | | 10 |
| Grannskoðar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 75 | | 0 |
| Trygging | 39 | | 54 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 483 | | 272 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 202 | | 528 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.416** | **1.729** | **1.352** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐIÐ - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2004 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Telduútbúnaður og edv-menning | 510 | | 78 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 4 | | 33 |
| Søla av brúktum skrivstovuútb. | -5 | | 0 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **509** | **0** | **111** |
| Húsaleiga | 11 | | 191 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 18 | | 60 |
| Skattur, avgjøld o.t. | 0 | | 4 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **29** | **40** | **256** |
| Rakstraravskrivingar | 0 | | 11 |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **11** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 0 | | 7 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **0** | **7** |
| Vørusøla til privat | -1 | | -5 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-1** | **-10** | **-5** |
| Toll- og nýtslugjøld | 5 | | 0 |
| **Skattur og avgjøld** | **5** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Fyrisiting løgtingsins tilsamans** | **6.229** | **6.330** | **5.706** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LØGTINGSARBEIÐIÐ TILSAMANS** | **23.184** | **24.962** | **22.427** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN

| Vanligt virksemi | t.kr. 2004 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 2.178 | | 1.912 |
| Tænastumenn | 1.011 | | 974 |
| Tímalønt | 21 | | 77 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 51 | | 38 |
| Eftirlønir | 222 | | 197 |
| **Lønir v.m.** | **3.482** | **3.820** | **3.198** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 17 | | 19 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 141 | | 130 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 0 | | 25 |
| Umboðan | 3 | | 19 |
| Orkukeyp - el | 12 | | 13 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 10 | | 10 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 13 | | 7 |
| Keyp av vørum annars | 131 | | 71 |
| Telefon | 24 | | 27 |
| Postgjøld | 5 | | 5 |
| Trygging | 6 | | 3 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 40 | | 45 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 136 | | 652 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **537** | **507** | **1.025** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 175 | | 12 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 54 | | 1 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **229** | **140** | **13** |
| Húsaleiga | 190 | | 190 |
| Langtíðarleiga og leiga annars | 3 | | 0 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldskostnaður, bygningar | 3 | | 0 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum v.m. | 11 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **207** | **266** | **190** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 5 | | 0 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **5** | **2** | **0** |
| **Rentukostnaður o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - innt.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Vanligt virksemi tilsamans** | **4.460** | **4.735** | **4.427** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN - framhald

| Løgtingsgrannskoðararnir | t.kr. 2004 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 56 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 1 | | 0 |
| | **57** | **120** | **0** |
| Ferðing og flutningur, alment sett- innanlands | 1 | | 0 |
| Umboðan | 23 | | 0 |
| Keyp av vørum annars | 1 | | 0 |
| Keyp av tænastuveitingum | 2 | | 0 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **27** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsgrannskoðararnir tilsamans** | **83** | **120** | **0** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LANDSGRANNSKOÐANIN TILSAMANS** | **4.543** | **4.855** | **4.427** |

| SKJAL C: LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR | | | |
|---|---|---|---|
| **Vanligt virksemi** | **t.kr. 2004** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2003** |
| Mánaðarlønt | 850 | | 641 |
| Tænastumenn | 608 | | 586 |
| Tímalønt | 15 | | 45 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 0 | | 2 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 23 | | 17 |
| Eftirlønir | 102 | | 78 |
| **Lønir v.m.** | **1.597** | **1.600** | **1.368** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 0 | | 9 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 36 | | 64 |
| Umboðan | 1 | | 15 |
| Orkukeyp - el | 3 | | 3 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 11 | | 5 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 0 | | 1 |
| Keyp av vørum annars | 28 | | 34 |
| Telefon | 29 | | 24 |
| Postgjøld | 7 | | 6 |
| Trygging | 4 | | -1 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 79 | | 59 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 213 | | 96 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **411** | **600** | **316** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 100 | | 0 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 118 | | 8 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **217** | **0** | **8** |
| Húsaleiga | 165 | | 56 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **165** | **150** | **56** |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **150** | **0** |
| Søla av vørum og tænastum | -4 | 0 | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR TILSAMANS** | **2.386** | **2.500** | **1.749** |

| SKJAL D: EFTIRLØN OG BÍÐILØN TIL LØGTINGSMENN | | | |
|---|---|---|---|
| **Kostnaður** | **t.kr. 2004** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2003** |
| Mánaðarlønt | 716 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 7 | | 0 |
| **Lønir v.m.** | **724** | **0** | **0** |
| Tænastumannaeftirlønir | 2.692 | | 2.383 |
| **Tilskot til einstaklingar** | **2.692** | **3.435** | **2.383** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **EFTIRLØN OG BÍÐILØN TIL LØGTINGSMENN TILSAMANS** | **3.415** | **3.435** | **2.383** |

## SKJAL E: NÝGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS

| Kostnaður | t.kr. 2004 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 36 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 0 | | 0 |
| **Lønir v.m.** | **36** | **0** | **0** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 0 | | 0 |
| Keyp av vørum annars | 0 | | 0 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 0 | | 1 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **1** |
| Húsaleiga | 0 | | 2 |
| **Leiga. Viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **2** |
| Frádráttur fyri løguløn | -36 | | 0 |
| Frádráttur fyri ferðakostnað | 0 | | 0 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **-36** | **0** | **0** |
| Bygningar, privat | 778 | | 11.565 |
| Vegir, tunnlar, havnir o.a. , alment | 36 | | 0 |
| **Bygging og løguframleiðsla** | **814** | **2.500** | **11.565** |
| Toll- og nýtslugjøld | 0 | | 0 |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| Keyps-mvg | 0 | | 0 |
| **Keyps-mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **NÝGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS** | **814** | **2.500** | **11.567** |